Gerðabók býráðsins	
Fundardagur:	24. september 2015
Býráðsfundur nr.	11/2015
Borgarstjóri	Sonni á Horni
Fundarskrivari	Jákup Frants Larsen

Ár 2015 tann 24. september kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. September 2015 um innkalling til fundar.

Møtt vórðu:

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Gordon M. Petersen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann N. Toftegaard á lista A. sum boðað hevði frá, at hann hevði forfall til fundin.

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 48/2015 varð til viðgerðar.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Mál nr. 48/2015.

Mál viðvíkjandi 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlanarkarm fyri kommununa 2016.

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 12 september 2015 til fyribils fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2015.

Vísandi til § 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 01. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 01. desember.

Skattagrundarlagið er roknað út frá upplýsningum frá Taks, har inntøkan pr. 01. september 2015 er upproknað til eitt ár við skattaprosenti 21,5. Somuleiðis er botnfrádrátturin ásettur eftir útrokningum frá Taks.

Barnatalið er 380, og barnafrádrátturin er ásettur til til kr. 5.500,00 pr. barn í 2016, sum er sama upphædd sum fyri 2015.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi 16. september 2015 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini javnvigar við kr. 87.278.348, somuleiðis sum roknað verður við einum rakstraravlopi upp á kr. 3.473.022,00.

Avsettar eru kr. 7,1 mió til íløgu í keyp av gróti frá Havsbrún, sum er ein staðfest játtan, sum býráðið hevur framt tann 27. juli 2015 og gjørt ein bindandi avtalu við felagið um.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 73.758.348,00 og netto til kr. 54.581.331,00,00, rentuútreiðslurnar + rentustuðulin til kr. 3.402.000,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 3.000.000,00.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 50.559.353,00 við einum skattaprosenti upp á 21,5%, partafelagsskatturin verður fyribils verður til kr. 7.000.000,00 og inntøkur frá tí almenna fyri eldraøkið til kr. 14,0 mió, meðan eingin inntrøka fyribils er avsett við sølu av grundstykkjum. Møguligar inntøkur verða inntøkuførdar undir íløgum teknisk mál.

Fíggjarnevndin samtykt á fundi 16. september 2015 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarkarm fyri býráðið til 1. viðgerð.

Eftir 1. viðgerðina í býráðnum verður fíggjarætlanaruppskotið viðgjørt og gjøgnumarbeitt í føstu nevndunum í samráð við stovnsleiðarar og ábyrgdarfólk.

Avgerð:
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið aftur í fíggjarnevndina til 2. viðgerð. (9-0).

Mál nr. 49/2015.

Mál viðvíkjandi bilverju á Innandalsvegnum.

Í samband við at hetta mál er viðvíkjandi bilverju framvið ognini hjá Jann Toftegaard, metti Sonni á Horni, at Jann Toftegaard varð ógegniur í at luttaka í viðgerðini av hesum máli.
Jann mett seg ikki verða ógegnian tá ið hetta mál varð viðvíkjandi bilverju fram við almennum vegi.

Í samband við stuðlagarði sum nú verður gjørdur fram við niðaru vegsíðu á Innandalsvegnum mælir meirilutin Dánjal Vang og Jan Toftegaard á fundi í teknisku nevdini 30. Juni 2015 til, at bilverja verður gjørd á hesum vegastrekki, og at hendan verður eins og verandi verja við timburstokki omaná rundar bilverjupelar.

Minnilutin Petur Abrahamsen mettir hesa loysn vera sera vandamikla fyri børn, sum hann javnan sær ganga omaná timburstokkinum, og kunnu fáa stóran skaða um tey snáva á og detta oman í vegskráan.

Hann metti heldur ikki hesa loysn verða nøkur trygd viðv. bilferðslu, tá ið timburstokkurin hevur eina slíka hædd, at gronin á vanligur persónbili gongur undir timburstokkinum.

Hann er ikki ímóti at bilverja verður gjørd, men mælir tí frá at henda loysn verður vald. Hann krevur hetta mál fyri býráði til endaliga støðutakan.

Avgerð:
Broytingaruppskot frá Sonna á Horni: Undirritaði mæli býráðnum til at beina málið aftur í nevnd, fyri at lýsa málið nærri við at gera projekt og kostnaðarmeting fyri bilverjuna. Uppskotið fall. 4 atkv. fyri og 5 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein. Ímóti atkvøddu: Sigurð S. Simonsen, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Eyðun á Lakjuni og Gorson M. Petersen.

Atkvøtt varð síðan um minniluitauppskotið sambært tilmælinum frá teknisku nevndini. Uppskotið fall. 4 atkv. Fyri og 5 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein. Ímóti atkvøddu: Sigurð S. Simonsen, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen.

Til seinast varð atkvøtt um meirilutauppskotið frá teknisku nevnd. Uppskotið varð samtykt. 5 atkv. fyri og 4 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu: Sigurð S. Simonsen, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen. Ímóti akvøddu: Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Árant Berjastein.

Mál nr. 50/2015.

Umsókn frá Bindifestivalinum um skattafrælsi.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Taks, dagfest 02. September 2015 í sambandi við ummæli kommununar til umsókn frá Bindifestivalinum í Fuglafirði um skattafrælsi fyri teirra virksemi.

Taks-ráðið hevur heimild sambært skattalógina at játta skattafrælsi til feløg og stovnar vm, um so er, at inntøkan eftir stovnanarskipan, lógum og samtyktum, einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, hetta sambært § 3, stk. 3.

Vísandi til, at Taks-ráðið áðrenn avgerð um skattafrælsi verður tikin í málinum, vil hava álit í hesum føri frá Fuglafjarðar býráði í málinum, so varð málið lagt fyri fíggjarnevndina til ummælis. Hjálagt er avrit av "Viðtøkum fyri Bindifestivalin í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 16. September 2015 og mælir nevndin býráðnum til at viðmæla yvir fyri Taks, at skattafrælsið verður veitt Bindifestivalinum í Fuglafirði av virksemi sínum.

Avgerð:
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.45.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Gordon M. Petersen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen